Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Rimmar føðingardagur á Oyrarbakka



*Gott lag var á fiskimálaráðharrahjúnunum og vertunum*



*Løgmaður og frú vóru komin at heiðra føðingardagsbarnið, Edmund. Við lið hansara konan Edfríð*




*Stjórin á løgmansskrivstovuni væluppløgd til eitt gott kvøld saman við arbeiðsgevaranum*



*Nógv gott fólk mintist Edmund*



*Samgongufelagar, vinnir og kenningar heiðraðu og feiðraðu løgtingsformannin*

Løgtingsformaðurin helt leygarkvøldið seksti ára føðingardag í Eydnuni á Oyrabakka. Eydnan er næsti granni hjá Edfríð og Edmundi Joensen, og har vóru umleið 300 fólk samankomin. Har vóru børnini við teirra, har vóru familjurnar hjá bæði Edfríð og Edmundi, og har vóru bygdarfólk og avstaðsfólk, sum tað plagdi at verða tikið til.

Edmund Joensen hevur í út móti fjøruti árum verið frammarlaga í føroyska vinnulívinum og politiska lívinum. Millum mongu føðingardagsgestirnar vóru eisini mong umboð fyri vinnuliga og politiska lívið og eisini umsitingina - bæði í útinnandi og lóggevandi partinum.

Nógvur sangur og tónleikur var á skránni. Onkra løtuna var føðingardagsbarnið á pallinum. Áður hevur hann sungið í útvarpssending á nýggjárinum, og hann sigst eisini hava sungið á valfundum í losjuni í Gøtu. Nú hoyrdu gestirnir í Eydnuni løgtingsformannin syngja - ikki minni enn tvær ferðir - For dina blaua ogon skyld hjá Vikingarna.

Nógvir røðarar vóru. Edfríð Joensen hevur altíð verið manni sínum hollur stuðul. Leygarkvøldið vísti hon, at tað liggur væl fyri hjá henni at røða. Hon lýsti hjúnarfelagan sum mann og faðir, samstundis sum hann hevur verið vinnulívsmaður og seinni politikari. Hetta var bæði hugtakandi og áhugavert.

Politiska spektrið var umboðað alt sum tað var. Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sum í turbolentu níti árunum eitt skifti var felagi hjá Edmundi Joensen í landsstýrinum, heilsaði samgongufelagnum. Formaðurin í Sambandsflokkinum, Kaj Leo Johannesen, bar heilsu fram til fyrrverandi formannin í flokkinum, Kristian Magnussen, formaður í tingbólkinum hjá Javnaðarflokkinum, segði nøkur orð, Kári P. Højgaard, formaður í Sjálvstýrisflokkinum vísti, at hann hevur orðið í síni makt, Heðin Zachariassen heilsaði frá valdøminum hinumegin Sundalagið, og vinmaðurin Bjarti Skipanes á Skipanesi segði eisini nøkur orð.

Og so vóru tað tveir aðrir løgtingsmenn, sum høvdu orðið. Báðir eru teir tiltiknir røðarar, og báðir leggja teir seg nógv eftir at gera nógv burturúr røðunum. Óli Breckmann, sum neyvan verður tikin sum undirhaldari, umboðaði Fólkaflokkin, og Tórbjørn Jacobsen umboðaði Tjóðveldisflokkin. Føðingardagsgreinin, sum tjóðveldistingmaðurin hevði í blaðnum leygardagin, boðaði frá, at tjóðveldismaðurin á Glyvrum og sambandsmaðurin á Oyrabakka - hóast teir eru størstu mótsetningar í ríkisrættarliga spurninginum - eru meiri enn bara politiskir starvsfelagar. At teir eru persónligir vinmenn varð enn eina ferð undirstrikað, tá ið Tobbi var á pallinum og røddi.

Eftir borðhaldið var sangur, tónleikur og dansur. Orkestur spældi undir, men í onkrum steðgum varð samgonga skipað millum andstøðutingmann og samgongutingmann. Tjóðveldistingmaðurin, Tórbjørn Jacobsen, og sambandstingmaðurin í Suðuroy, Jóhan Dahl, sum á yngri árum fekst ikki so lítið við poppmusikk, tóktust finna væl saman, og í veitslulagnum vóru meiri enn ábendingar um, at tað eisini svingaði, tá ið teir báðir spældu.



*Fólkaflokkurin var væl umboðaður til føðingardagshaldið. Her Óli Breckamnn og frú og Bjarni Djurholm*



*Maiken frá løgmansskrivtovuni heilsar sínum fyrrverandi arbeiðsgeva. Eisini Asta, kent andlit úr Edmund´sa umhvørvið vitjaði*



*Tær gera sera klárar til ein rimmar føðingardag*




*Torbjørn tók fast um hondina á skil(a)manninum*



*Sambandshøvdingar hittast. Agnar Nielsen hevði lagt leiðin til Streymin*



*Pláss var eisini fyri teimum heilt smáu*

**Dagurin.**

**24. september. Tekla**, deyð umleið ár 100. Hon hevði hoyrt apostulin Paulus prædika og varð umvend. Hóast hon varð illa forfylgd, slapp hon undan hvørja ferð og doyði friðarliga 90 ára gomul.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæri maður, pápi, verpápi og abbi

**Niclas F. Niclasen**
**Sørvági**

andaðist og varð jarðaður.

Takk fyri blómur og kransar.
Tøkk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað. Eisini ein tøkk til tykkum mongu, sum á ymsan hátt hjálptu okkum.

**Hervør,**
**Edward, Dánjal og Jørgen v/ familjum**